

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 01 - 2013

# Vænta bíligari olju í ár

Oljuprísurin fer at fella í 2013, men tað er kortini einki, sum bendir á, at talan verður um nakað ógvusligt prísfall. Tað sigur Thina M. Saltvedt, sum er oljugreinari hjá NordeaMarkets. -Vit vænta, at oljan verður eitt vet bíligari í ár, enn vit hava gjørt í okkata framtíðarmetingum, tí vit vænta, at búskaparvøksturin í heiminum verður heldur minni enn væntað. Tað er millum annað galdandi fyri evruøkið og fyri Japan, sigur hon við Aftenbladet. Thina M. Saltvedt sigur, at í Nordea Markets vænta tey, at oljuprísurin verður 108 dollarar í meðal fyri tunnuna í hesum árinum. Tað er tríggjar dollarar minni enn í fjør. Men hon leggur afturat, at eftir framrokningunum kemur prísurin aftur upp á 111 dollarar í 2014. -Tað kemst av, at vit vænta betri samsvar ímillum útboð og eftirspurning, sigur hon. Óvanligt ár Greinarin hjá Nordea Markets vísir á, at 2012 var eitt rættiliga óvanligt ár í oljuhøpi. Útflutningurin úr Suðursudan er steðgaður, og tiltøkini ímóti Iran hava gjørt, at landsins oljuútflutningur er minkaður nógv. Hinvegin hevur Saudiarabia økt sína framleiðslu. Óvissan í útboðnum og gongdin í eftirspurninginum góvu stór sveiggj í oljuprísinum í 2012. Teir fyrstu tríggjar mánaðirnar hækkaði prísurin á Norðsjóvarolju upp um 125 dollarar fyri tunnuna, í øðrum ársfjórðingi datt hann niður á 90 dollarar, og um summarið lá hann um 110 dollarar. Amerikanska orkuumsitingin, EIA, væntar, at prísurin á Norðsjóvarolju verður 103 dollarar í meðal fyri tunnuna í ár. Annars byrjaði 2013 við einum hækkandi oljuprísi. Hann var mikudagin nærum 112 dollarar fyri tunnuna.